

Johan Dah, landsstýrismaður og Kaj Leo Johannesen, løgmaður í góðum Statoil-selskapi, Helge Lund, forstjórin og Rúni M. Hansen, føroyski Statoilstjórin. Mynd Jan Müller

# Johan Dahl: Góðar vónir um nýggjar leitimøguleikar

Deil:

**Jan Müller**

15.08.2014 - 11:52

Oljan.fo

Hóast landsstýrismaðurin í oljumálum, Johan Dahl er vónsvikin av úrslitinum av teirri seinastu boringini á landgrunninum, so hevur hann góðar vónir um, at oljuvinnan fer at vísa nýggjum leitimøguleikum ans.

“Eg fegnist um, at arbeiðið at bora brunnin hevur gingið trygt og væl, men tað var spell, at kolvetni í vinnuligum nøgdum ikki vórðu staðfest.

Leitivirksemið á landgrunninum heldur fram og arbeitt verður við at vísa oljuvinnuni á nýggjar leitimøguleikar, sum vit hava góðar vónir um, at vinnan fer at vísa ans.

Landsstýrismaðurin, sum eisini umsitur vinnumál sum heild, fegnast eisini stórliga um, at Statoil og North Atlantic Drilling, ið eigur pallin, West Hercules, hava gjørt av at gera viðlíkahald uppá pallin í føroyskari havn.

“Hetta er stór álitisváttan til føroyska veitaravinnu og kann verða eitt frambrot fyri føroyska vinnu í strembanini eftir at økja um veitingar til oljuvinnuna úti í heimi eisini.

Samanumtikið fara vit framhaldandi at virka fyri leitivirksemi á landgrunninum og eisini eftir at styrkja møguleikarnar hjá føroyskari vGóðarnnu at lata vørur og tænastur til altjóða oljuvinnuna, har stórir møguleikar liggja fyri framman.”